**Skeiðshaldarar:**

**Johnny Lundgreen**, Tekniski Skúlin í Roskilde. Johnny hevur arbeitt við evninum Bjálving/Dampsperru burturav seinastu árini, og fæst einamest við at eftirútbúgva handverkarar innan hetta økið og hevur Tekniski Skúlin í Roskilde gingið á odda við at eftirútbúgva handverkarar innan Bjálving/Dampsperru í nøkur ár.

**Per Hindkær**, Tekniski Skúlin í Svendborg, hevur verið við til at skriva fleiri frálærubøkur til Træfagenes Byggeuddannelse, hetta eru bøkur, sum Teknisku Skúlarnir dagliga brúka í síni frálæru, og hevur hann eisini staðið á odda fyri fleiri eftirútbúgvingarskeiðum av handverkarum.

Á skeiðnum luttekur eisini ráðgevingarfyritøkan **Martin E. Leo**. Hesir eru teir einastu í Føroyum, sum gera tær sokallaðu Blower Door royndirnar. Teir koma eisini at siga nakað um teirra royndir á økinum.

Ætlanin við skeiðnum er eisini at skapa eitt forum, har handverkarar hittast og kjakast um loysnir og trupulleikar, sum vit møta í okkara dagliga arbeiði.

**Stuðla verkætlanini hevur Innlendismálaráðið**.



**Hentir upplýsingar**

**Skeiðið er ætlað handverkarum/timburmonnum, sum dagliga fáast við hetta arbeiðið. Men onnur áhugað eru eisini vælkomin.**

**Tilmelding og upplýsing:**
Ring á telefon 224898 ella send ein teldupost til sjurdur.solstein@skulin.fo
Seinast freist at tekna seg er 17.aug. 2010.

**Avboð:**
Møgulg avboð skulu gevast í seinasta lagi eina viku áðrenn skeiðið byrjar.

**Gjalding:**
Goldið verður áðrenn skeiðið byrjar, annaðhvørt sum flyting á kontunr. 9865 185.030.4 í Norðoya Sparikassa ella kontant á skrivstovu skúlans.

**At hava við:**
Arbeiðsklæðir. Amboð o.a. er á skúlanum.

**Skeiðið verður í døgunum 24. og 25. august og verður frá kl. 08.00 til 16.00 báðar dagarnar.**

**Kostnaður:**
Skeiðini eru løgd saman soleiðis, at tú mást luttaka á báðum skeiðum. Kostnaðurin er kr. 1000,- .Her er alt íroknað, eisini skeiðstilfar og kostur fyri báðar dagarnar

Hesin faldarin liggur eisini sum PDF -fílur inni á
**http://tsk.fo/**

# Skeið á Tekniska Skúla í Klaksvík

Tekniski Skúlin í Klaksvík skipar í døgunum 24. og 25. august fyri eftirútbúgvingarskeiði fyri handverkarar og øðrum áhugaðum.

## Skeið í Dampsperru



## Skeið í at boyggja gips



# Skeið í Dampsperru

Skeiðiðum dampsperru er skipað í tveimum pørtum. Ein ástøðiligur partur, har ástøðin handan bjálving og dampsperru verður lýst, harumframt fæst upplýsandi tilfar um góðsku av vørum hesum viðvíkjandi. Luttakarin fær skeiðstilfar um bjálvingarhættir og leiðbeiningar viðvíkjandi uppsetan av dampsperru.



Harumframt ein verkligur partur, har ástøðin verður roynd í verkið. Farið verður út á verkstaðið, har rovini av 4 húsum standa, ( hvørt hús er uml. 15m$^2$) Luttakarnir verða skipaðir í 4 bólkar. Hesir skulu seta upp 4 ymiskar dampsperrur í hesi húsini. – Tá hetta er gjørt, verður roykur blástur inn í húsini. So verður gjørd ein ”Blower Door Test”. Hetta verður gjørt á tann hátt, at lufttrýst verður sett á húsið.

Um trykkið fellur ov skjótt, lekur dampsperran ov illa og luttakarin sær, hvar hesir lekar ”typiskt” eru,



við at roykur kemur út gjøgnum lekarnar. - Hetta fyri at gera luttakaran tilvitaðan um týdningin av at gera handverkið rætt og ábyrgdarfult.



Luttakarin lærir hvar mistøkini oftast vera framd, og gerst tilvitaður um góðskuna, tey ymisku produktini hava.

**Skeiðshaldari:** Skeiðsleiðari verður Johnny Lundgreen frá Tekniska Skúlanum í Roskilde.

# Skeið í at boyggja gips

Skeiðið er skipað í tveir partar, ein ástøðiligur partur og ein verkligur partur.



Á skeiðnum lærir tú at boyggjaog líma gips, at gera formar til at boyggja eftir o.a.



**Skeiðshaldari:** Skeiðsleiðari verður Per Hindkær frá Tekniska Skúlanum í Svendborg.